Álit

í

løgtingsmáli nr. 63/2022: Uppskot til løgtingslóg um at umbyggja hølini hjá Apoteksverkinum á Staravegi 15 í Tórshavn

Landsstýrismaðurin í heilsumálum, Margit Stórá, hevur lagt málið fram 7. mars 2023, og eftir 1. viðgerð 20. mars 2023 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 13. og 27. apríl 2023.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við landsstýrismannin í heilsumálum, Margit Stórá, saman við Apoteksverkinum og Landsverki.

Endamálið við uppskotinum er at útvega heimild í verklagslóg til at fara undir umbygging av hølunum hjá Apoteksverkinum á Staravegi 15.

Ein samd nevnd staðfestir, at útbyggingin er ætlað at hava við sær, at størri partur av umsitingarliga virkseminum verður í sama bygningi, at arbeiðsumstøðurnar á Staravegnum batna, og at virksemið á Tjaldurs Apoteki í R.C. Effersøesgøtu verður meira savnað um kundavenda virksemið.

Byggitekniskt snýr tað seg um at umbyggja ein part av goymsluhøllini við at skilja hana sundur í tvær hæddir (leggja dekk í) fyri at fáa fleiri skrivstovur, fundarhøli og felags matarhøll, umframt at endurnýggja fasadurnar á bygninginum, har nýggj glasfasada verður gjørd norðeftir, og timburklædningurin verður renoveraður.

Kostnaðurin av umbyggingini er settur soleiðis saman, at heimild verður til at brúka upp til 19 milliónir krónur til byggingina, og at løgujáttan verður á fíggjarlógini til byggingina, meðan avlopskrav verður ásett hjá Apoteksverkinum næstu árini, sum rindar fyri byggingina.

Við øðrum orðum skal avlopskrav ásetast fyri Apoteksverkið, og hetta verður ásett við einari upphædd, sum svarar nøkulunda til tað, sum vanligu rakstraravlopini hava víst seg at vera seinastu árini. Sambært viðmerkingunum til uppskotið skal talið vera 6,5 milliónir krónur í 2023 og 2024, og síðani 6 milliónir krónur í 2025. Eftir hetta er møguleiki at strika avlopskravið aftur.

Av hesi orsøk er blivið upplýst nevndini, at hendan íløgan fer ikki at ávirka kostnaðin á heilivági hjá vinnu og borgarum í Føroyum, men tað fer at hava við sær, at ein inntøka verður brúkt til bygging í ár og næstu 2 árini, sum árini frammanundan í høvuðsheitum hevur verið nýtt til KT-verkætlan, umframt viðlíkahald og annað hjá Apoteksverkinum.

Nógv umrøða hevur verið av spurninginum, hvussu almennar verkætlanir skulu bjóðast út, hvørt kostnaðir skulu leggjast fyri tingið eftir meting áðrenn útboð ella eftir, at útboð hevur verið, umframt

aðrir spurningar í hesum sambandi. Í hesum føri er talan um verkætlan, sum hevur verið boðin út, men sum skal í nýtt útboð.

Fíggjarnevndin hevur undir viðgerðini fingið upplýst, at spurningar í samband við útboð, hvussu tey skulu skipast, og hvussu tíðliga í tilgongdini hetta skal leggjast fyri tingið, verða viðgjørdir av Fíggjarmálaráðnum og Landsverki í løtuni samsvarandi ynskjunum frá Løgtinginum, og at niðurstøður frá hesum kunnu væntast í næstum.

Nevndin hevur somuleiðis fingið upplýst, at tað er ikki orsøk at halda, at samlaði kostnaðurin av hesi verkætlan við bygging, ráðgeving og øðrum kostnaðum fer upp um tað, sum heimilað verður við hesi verklagslóg.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 4. mai 2023

Eyðgunn Samuelsen formaður	Beinir Johannesen næstformaður	Bjarni Hammer
Eirikur í Jákupsstovu	Hanna Jensen	Magnus Rasmussen
	Steffan Klein Poulsen	